# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 14. januar 2010

# SÍ fekk mótstøðu frá ÍF

**Sørvingar vunnu 3-0 og halda framvegis tørn í kappingini um at koma í FM-finalurnar. Men hóast fuglfirðingar eru botnlið, góvu teir einki frá sær ókeypis í Sørvági í gjárkvøldið**




Hilmar Jan Hansen



Bæði SÍ og ÍF vístu gott verjuspæl, tá liðini í gjárkvøldið spældu ein javnari dyst, enn 3-0 sigurin hjá SÍ kundi bent á. Her er tað Jón Falkvard hjá SÍ, sum roynir at leggja trýst á fuglfirðingar
Mynd: Álvur Haraldsen

Enn eru sjey umfør eftir í Eik-liguni hjá monnum, so her kann nógv henda, áðrenn endaliga er greitt, hvørji tvey lið koma í FM-finalurnar, sum verða spældar eftir lokna landskapping. Men tað mesta av árinum hevur Mjølnir sitið á øðrum finaluplássinum, meðan kappingin um hitt plássið í finaluni hevur staðið millum SÍ og Fleyr.

Tann støðan er einki broytt eftir dystin í Sørvági í gjárkvøldið, tí har eydnaðist SÍ at liva upp til favorittleiklutin og vinna 3-0, hóast talan í løtum var um dygga mótstøðu frá ÍF, ið enn eigur fyrstu stigini til góðar, men støðugt tekur seg fram og í spældygd tykist nærkast hinum liðunum.

Mjølnir hevur framvegis munin og er trý stig framman fyri SÍ og fimm stig framman fyri Fleyr, men fyri tað eru allar súðir ikki syftar enn. Hóast Mjølnir er favorittur, skal liðið møta bæði SÍ og Fleyr tvær ferðir aftrat, áðrenn kappingin er komin at enda, og somuleiðis møtast SÍ og Fleyr tríggjar ferðir aftrat, so her eru nógv stig at spæla um.

**SÍ-ÍF 3-0**

(25-19, 26-24, 25-20)

Hóast tølini siga, at talan var um ein greiðan sigur, tí SÍ vann 3-0, var veruleikin á vøllinum kanska ikki heilt so einfaldur. Øll trý settini stríddist ÍF av øllum alvi, og serliga í verjuspælinum góvu fuglfirðingar seg so mikið langt, at hetta ikki varð nakar lættvunnin dystur hjá SÍ.

Í fyrsta setti førdi ÍF fyri tað mesta við einum ella tveimum stigum upp til 13-13, men so tók SÍ yvir og hevði leiðsluna restina av settinum. Spælið hjá SÍ var ikki av tí besta, og serliga var tað í álopsspælinum, at tað haltaði, meðan móttøkurnar og verjuspælið hinvegin legði botn undir sigurin.

Tað var um reppið, at ÍF fekk tikið annað sett. Har var SÍ á odda 23-20, tá ÍF gjørdi ein vørr og vann seg framum 23-24. Men fuglfirðingar megnaðu ikki at leypa nógv væl á, og tí vunnu sørvingar tríggjar teir síðstu bóltarnar.

Fyri áskoðararnar mundi triðja settið vera tað stuttligasta at hyggja at, tí hóast SÍ vann tað við fimm stigum á muni, stríddist ÍF enn meira, nú tað hevði verið so nær í øðrum setti. Av tí sama gjørdust nógvir langir bóltar, men tá avtornaði, høvdu sørvingar munin og vunnu settið og dystin.

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 11 | 9 | - | 2 | 29 | 11 | 18 | 11 |
| 2 SÍ | 11 | 7 | - | 4 | 25 | 18 | 7 | 8 |
| 3 Fleyr | 11 | 5 | - | 6 | 25 | 22 | 3 | 6 |
| 4 ÍF | 11 | 0 | - | 11 | 2 | 30 | -28 | 0 |

# Byrja við Sveis í morgin

**Landsliðsvenjarin heldur, at ímóti Sveis og Hvítarusslandi skal tapið avmarkast, men at kanska ein møguleiki er ímóti Kypros, sum í styrki bara er eitt lítið petti framman fyri Føroyar**




Hilmar Jan Hansen



Tann fyrsti av teimum trimum HM-dystunum hjá manslandsliðnum í hondbólti, sum skulu spælast á Kypros eftir bara trimum døgum, verður seinnapartin í morgin ímóti Sveis
Mynd: Andreas Wagner

Tá fleiri landsdystir eru á skránni rað á rað, plaga teir at verða spældir leygardagar og mikudagar, so liðini fáa hvílt seg ímillum, men í so máta er skráin nógv harðari, nú føroyska manslandsliðið í hondbólti skal spæla tríggjar HM-undankappingardystir í tríggjar dagar.

– Hetta er harður kostur hjá okkara monnum, ið ikki eru vanir við at spæla við so lítlum steðgi ímillum. Vit mugu bara royna at blanda kortini sum frægast, men í øllum førum ger hetta, at allir, sum eru við á liðnum hesa ferð, sleppa at spæla, sigur Dia Midjord, sum saman við Kára Nielsen hevur ábyrgdina av manslandsliðnum.

Teir tríggir dystirnir verða spældir á Cyprus College Athletic Centre í Nicosia, og tann fyrsti verður longu á skránni í morgin klokkan 15, føroyska tíð, og hann er ímóti Sveis, sum vit eisini vóru í bólki við í undanfarnu EM-undankappingini. Leygardagin klokkan 13 spæla Føroyar ímóti Hvítarusslandi og sunnudagin klokkan 12 ímóti Kypros.

– Heilt yvirskipað skulu vit syrgja fyri at standa okkum so væl sum gjørligt móti Sveis og Hvítarusslandi. Um alt gongur upp í eina hægri eind, so mótstøðuliðini undirmeta okkum, samstundis sum tað gongur teimum illa og alt riggar hjá okkum, kunnu vit fáa eitt fantastiskt úrslit, sigur Dia Midjord.

– Men tað verður móti Kypros, at vit hava møguleikan at spæla við. Og hóast vit ikki eru favorittar, er tað dysturin, har vit kunnu fáa stig.

Landsliðið fór úr Føroyum seinnapartin í gjár og hevur í nátt gist í Keypmannahavn. Tíðliga í morgun helt ferðin fram til Kypros umvegis Wien. Eftir lokna kapping byrjar heimferðin mánanáttina, og seinnapartin mánadagin er hópurin aftur í Føroyum.